# Føroya Banki á North Atlantic Fish Fair

**Føroyski bankin tekur lut í North Atlantic Fish Fair, tí tað er týdningarmikið fyri bankan at møta kundum og samstarvsfeløgum sínum, har ið tey møtast og handla**

FÍGGJARVINNA

Tíðindaskriv

Føroya Banki er leiðandi vinnubanki í Føroyum og er í fremstu røð, tá tað kemur til at veita tænastur til fiskivinnuna. The North Atlantic Fish Fair er eitt sera gott høvi hjá okkum at fylgja við í tí, sum fer fram í fiskivinnu, bæði her heima og altjóða.

Í hundrað ára longu søgu bankans, hevur Føroya Banki ment eina stóra servitan millum vinnukundaráðgevar sínar um viðurskifti, ið viðvíkja fiskivinnuni. Søguliga hava størstu vinnukundar bankans altíð verið innan fiskivinnuna og bankin leggur seg eftir áhaldandi at menna ráðgeving sína á hesum økinum.

### Framløgur

Umboðsfólk fyri Føroya Banka fara at hava tríggjar framløgur í sambandi við tiltakið. Súni Schwartz Jacobsen, stjóri og leiðari fyri vinnuøkið, fer at hava eina framløgu um møguleikarnar fyri vinnuna í Føroya Banka. Johnny Í Grótinum, íløguleiðari, fer at hava eina framløgu um íløgumøguleikar í Føroya Banka. John Rajani, leiðari fyri Corporate Finance deildina, fer eisini at hava eina framløgu.

Sum fyrsti banki í Føroyum, stovnaði Føroya Banki eina Corporate Finance deild í august 2006, tí tørvur var á ráðgeving í sambandi við keyp og sølu av fyritøkum.

Framløgurnar verða í stóra gummibátinum á hesum tíðum:

Hósdag 3. mai kl. 15.00
Fríggjadag 4. mai kl. 11.00
Fríggjadag 4. mai kl. 15.00

### Visión, missión og virðir

Føroya Banki orðaði í 2006 eina nýggja visión og missión. Hetta varð gjørt sum liður í framfýsnu vakstrarætlan bankans. Visiónin er at vera leiðandi banki í Føroyum og altjóða at veita kundum útvaldar fíggjartænastur. Missiónin er at gera tað fíggjarliga møguligt hjá kundunum at fullnýta síni evnir og møguleikar. Bankin hevur eisini sett orð á sítt virðisgrundarlag. Bankin er og vil vera dugnaligur, eldhugaður og framsøkin.



*Sum fyrsti banki í landinum stovnaði Føroya Banki í fjør eina Corporate Finance deild*

# Føroya Banki at the North Atlantic Fish Fair

**Føroya Banki participates in the North Atlantic Fish Fair because it is important for the Bank to meet its customers and partners in the places where they meet and do business**

FINANCE

Tíðindaskriv

Føroya Banki is the leading corporate bank on the Faroe Islands and is in the forefront when it comes to providing financial services to the fishing industry. The North Atlantic Fish Fair presents an excellent opportunity for us to keep abreast with what is happening in the fishing industry, both within the Faroe Islands and internationally.

Throughout its 100-year long history, Føroya Banki has cultivated a particular expertise among its corporate banking advisors, who have established durable business connections to the Bank's customers in the corporate business area. Føroya Banki's biggest corporate customers have always been in the Faroese fishing industry and the Bank strives to continually improve service in this area.

### Presentations

Representatives from Føroya Banki will hold 3 presentations in connection with the event. Súni Schwartz Jacobsen, managing director and head of corporate banking will have a presentation on behalf of the Corporate Banking department. Johnny Í Grótinum, manager, will have a presentation about investment opportunities on behalf of the Bank's Markets & Treasury. John Rajani, head of the Bank's new Corporate Finance department will also have a presentation.

The Bank started its Corporate Finance department in August 2006 to satisfy the growing need for advisory services in connection with the buying and selling of companies.

The presentations will be in the big life raft at these hours:

Thursday 03 May 3 pm
Friday 04 May 11 am
Friday 04 May 3 pm

### Vision, Mission and Values

In 2006 FØROYA BANKI expressed its vision and mission. This was done as part of the Bank's proactive growth plan. Its vision is to be the leading bank on the Faroe Islands and internationally to provide its customers with selected financial services. Its mission is to make it financially possible for customers to achieve their full potential. The Bank has also expressed its value foundation. The Bank is and wants to be characterised as Competent, Committed, and Proactive.

Sosialurin